Gott kvøld øll somul!

Sunda kommuna gongur nú aftur undan. Tað er eitt megnar tak, sum tit í Sundalagnum hava tikið. At skráseta og talgilda øll staðarnøvn – yvir 5000 í tali – krevur sítt. Tað krevur dygga samskipan, tað krevur nógv tol og tað krevur sanniliga eisini stórt hegni. Úrslitið hátíðarhalda vit her í kvøld.

Umfatandi skrásetingin og talgildingin er einki minni enn ein dýrgripur. Ein dýrgripur, sum fer at kveikja áhugan fyri hesum øki enn meira. Ein mentanarligur og søguligur dýrgripur, sum nú er tøkur hjá okkum øllum. Stóra tøkk skulu tit øll hava fyri tað!

---

Vit kunnu í kvøld øll ásanna, at tað er í lendinum, at minnið grør.

Nú eru gøturnar gingnar og skrásettar, áðrenn tær verða gloymdar.

Og vit kunnu nú taka tær niður á telefonina, áðrenn vit fara ein túr niðan í fjøllini.

Og á heimasíðuni hjá kommununi fæst nærri at vita, nær gangast skal og hvussu leingi túrarnir eru at ganga.

Hetta er tænasta í serflokki.

---

Verkætlanin hjá tykkum í Sundalagnum er í roynd og veru eitt samanspæl millum tvey tey elstu evni, vit vita um: náttúruna og menniskjuna.

At vit sum menniskju ikki gloyma søguna, hóast tíðirnar broytast.

Og tíðirnar eru broyttar. Tøknin hevur kollvelt okkara gerandisdag.

Um eg um aldaskiftið hevði spurt tykkum, um tit trúðu uppá, at í 2016 fóru vit øll at ganga í Tjørnuvík við eini teldu í reyvalummanum, so høvdu tit ivaleyst hildið at eg var í ørviti.

Men soleiðis er veruleikin.

Í dag ganga vit við eini teldu í lummanum, sum er íbundin, "online", allastaðni har telefondekningur er. At lítla teldan enn eisini er ein telefon, er í dag mest sum ein viðfáningur.

---

Góðu tit øll.

Vit føroyingar fáa ofta í skógvarnar, at sundurlyndi er eitt sereyðkenni hjá okkum herheima. Er tað ikki politikkur, so er tað lokalpatriotisma ella agg millum ítróttarfeløg, ið gera seg galdandi. Hesum fordómum hava tit í Sundalagnum so dyggiliga gjørt til skammar. Tykkara savningarmegi er øgilig. Sum samfelag kunnu vit læra av eindarkensluni, sum tit í Sundalagnum vísa í verki.

Og júst samstarv er lykilin til frálíka úrslitið, vit hátíðarhalda í kvøld. Áhugin og virðingin fyri nærumhvørvinum er stórur. So stórur, at fleiri eldsálir og undangongufólk í økinum hava lagt nógv fyri. Uttan tykkara íkast, tori eg at siga, var ikki komið so væl burturúr.

Til lukku við hesum frálíka átaki, tit í Sunda kommunu, og øll undangongufólkini, sum á hesum leiðum hava gjørt hetta møguligt.

Takk fyri!